TAKS hevur hesar viðmerkingarnar til broytingina í kapitalvinningsskattalógina:

Tá ásetingarnar í kapittul 1 b um tilflyting verða strikaðar, má § 2 d eisini broytast, tí hendan ásetur eisini handilsvirði við tilflyting.

Uppskot til orðing:
"§ 2d. Fær persónur, fevndur av reglunum í §§ 2 a - 2 c, aftur skattligan heimstað í Føroyum, verða virðisbrøv, sum persónurin framhaldandi eigur tilflytingardagin, mett sum útvegað, tá tey vórðu útvegað og fyri veruliga útveganarvirðið. Skattur goldin í Føroyum eftir reglunum í §§ 2 a - 2 c av virðisbrøvunum, sum persónurin framhaldandi eigur við tilflyting, kann verða drigin frá í tí skatti, sum skal latast í Føroyum við avhending av hesum virðisbrøvum. Er skatturin goldin eftir reglunum í §§ 2a-2c av hesum virðisbrøvum størri enn skatturin við avhending og eftir frádrátt fyri skatt goldin Danmark, Grønlandi ella øðrum landi eftir ásetingunum í tvískattasáttmála ella í § 19 í hesi løgtingslóg, verður munurin útgoldin sum avlopsskattur."

Viðmerkingar:
Stk. 1. Við ásetingini í 2. pkt. verður heimild givin fyri at geva frádrátt fyri skatt, sum longu kann vera goldin í Føroyum við fráflyting ella seinni, eitt nú orsakað av at treytirnar fyri skuldargjaldsfreist ikki eru hildnar. Goldin skattur eftir reglunum í §§ 2 a – 2 c er at skilja sum skattur, sum er goldin eftir frádrátt fyri tap sambært reglunum í §§ 2 a – 2 c. Frádráttur verður bert latin í skatti, goldin fyri ítøkiligu virðisbrøvini, sum skattgjaldari framhaldandi eigur tilflytingardagin, og verður givin í tí inntøkuárið hesi verða seld. Um øll virðisbrøvum ikki verða seld sama inntøkuár, verður frádráttur fyri skatt, bert givin lutfalsliga fyri tann ítøkiliga skattin á teim seldu virðisbrøvunum.

Við tilflyting til Føroyar kann persónur hava goldið fráflytingarskatt í øðrum landi. Hesin skattur kann dragast frá í skatti, sum skal vera rindaður í Føroyum við avhending av virðisbrøvunum. Frádrátturin verður veittur eftir reglunum í tvískattasáttmála ella eftir § 19 í kapitalvinningsskattalógini. Eftir KVS § 19 kann persónurin ongantíð fáa størri frádrátt enn tann skattur, sum lutfalsliga fellur á ta í øðrum landi skattaðu inntøkuna, sum eisini er skatta í Føroyum. Persónur hevur rætt til frádrátt fyri skatt goldnan uttanlands av teimum ítøkiligu virðisbrøvum sum persónurin framhaldandi eigur tilflytingardagin, og frádrátturin verður givin í tí inntøkuárið virðisbrøvini verða seld. Hetta er galdandi eisini hóast tað kunnu verða ár millum at skattur er goldin uttanlands, og at skattur skal rindast í Føroyum í sambandi við avhending av virðisbrøvunum. Um øll virðisbrøvini ikki verða seld sama inntøkuár, verður frádrátt fyri skatt goldnan uttanlands, givin lutfalsliga fyri tann ítøkiliga skattin á tey seldu virðisbrøvini.

Vinarliga

Birta Biskopstø
Deildarstjóri

Lógardeildin og Tolldeildin

TAKS

Postrúm 2151, 110 Tórshavn

www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.